miðvikan

Nr. 218 • 12. nov. 2008

Søguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

## Hvítanes:

# Ein bygd verður til

**Vit høvdu herfyri í røðini Hendur ið Sleptu eina frásøgn um Skora Pól, sum var uppsitari á sorinskrivaragarðinum í Norðradali. Pól eigur eina stóra ætt. Vit fara í hesi grein at umrøða eina av hansara ættargreinum. Tað er henni hjá Honnu Mariu, dóttir Poul. Høvuðsheimildarfólk til hesa grein er Naena Danielsen. Naena er eitt fróðarfólk, ikki minst tá ið tað kemur til ættarsøgu. Hon hevði eisini fleiri áhugaverdar ættargreinir úr Gøtu í FF-blaðnum, ta tíð tað var**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

### Um Hvítanes

Tað var amtmaðurin Frederik Ferdinand Tillisch, sum í síni embætistíð frá 1830 til 1837 heitti á menn um at fáa búseting á Hvítanesi fyri at hjálpa fólki, ið ofta settu upp har. Vanliga vóru tey illa fyrikomin, tá ið eingin var at taka ímóti teimum, um tey slitu land upp á hesum leiðum. Hetta kundi vera eitt slag av bjargingarstøð.

Eitt dømi um, at hetta kom at tæna væl sínum endamáli, var, tá ið Jørgen av Nesi umkomst við báti sínum á veg úr Havn inn á Nes, og tvey av teimum fimm fólkinum umborð vórðu bjargað. Ein maður á Hvítanesi helt seg hoyra neyðarróp. Ein bátur varð flotaður, og teir funnu tey neyðstøddu í myrkrinum. Trý vórðu bjargað, men ein av teimum, 12 ára gamli Ginn, hevði svomið so leingi at leitað eftir systrini, ið druknaði, at hann var deyður, tá ið teir komu fram til læknan.

Naena minnist, at hon hoyrdi ofta sum barn um hendan tilburðin, og tað hevði stórt árin á hennara barnasinni. Hon minnist eisini innskriftina á steinin, ið blev reistur yvir Ginn: "Kæmp for alt, hvad du har kært, dø om så det gælder, da er livet ej så svært, døden ikke heller."

### Teir byrjaðu á berum

Niðursetumenninir fingu í boði tveir bátar, eitt fýramannafar og eitt áttamannafar. Hetta var tað einasta, sum teir fingu frá tí almenna. Traðirnar vóru leigutraðir, ið teir keyptu seinni. Teir fingu torvheiðar av Hoyvíkshaganum og rætt til summarbit hjá neytunum.

Í 1837 var Pløyen amtmaður í Føroyum. Hann stuðlaði væl hesum niðursetumonnum, tá ið á stóð.

Hvítanes hevur navnið eftir tí hvíta sandinum, sum fyrr í tíðini legðist uppi á Hvítanesi í stórari mongd. Fleiri av teimum á Hvítanesi seldu skelsand.

Teir høvdu eisini skyldu til at lata skelsand til at fríðka um kirkjugarðin og uttanum kirkjuna í Havn.

Hvør maður skuldi arbeiða 14 tímar "plikt" árliga at halda bygdina reina og vegirnar viðlíka inni í bygdini.

Teir, ið bygdu Hvítanes, vóru fimm kollfirðingar og ein lambamaður, Poul á Kinn. Hann hevði tænt í langa tíð á Dímun, og á Hvítanesi varð hann kallaður Lamba Poul.



*Hvítanes um 1900 teknað av Ingálvi av Reyni eftir gamlari ljósmynd*

### Hjá Lamba Poul

Fýra av húsunum vóru undir einari lon og blivu rópt Niðri í Túni.

Tað eystasta húsið átti Lamba Poul. Har kom man fyrst inn í fjósið, sum var tað vanliga tá. Síðan inn í roykstovuna, har var kovi, og so inn í stovuna. Eisini har var moldgólv. Inni hjá Lamba Poul var eisini eitt katólskt kapell, men tað fara vit at koma aftur til í eini komandi frásøgn.

Poul var tiltikin kvøðari. Hann dugdi eisini væl at yrkja, og dóttir hansara Kyrstin hevði eisini eina stak góða rødd. Hon var trúlovað lorvíkingi, sum datt oman og doyði. Hon bleiv verandi ógift.

Kona Lamba Poul var úr Kollafirði og æt Kristianna.

Skála Hans giftist inn til teirra við Elspu Malenu, dóttir teirra.



*Naena Danielsen er heimildarfólk til hesa frásøgn*

Hann var kúlutur, men ógvuliga raskur til arbeiðis. Hann hevði verið hjá fyrsta handilsmanninum í Fuglafirði, kallaður Skála Jógvan. Har komu altíð enskir sjómenn inn, so hann dugdi enskt. Hann hevði eisini eina sera vakra handskrift.

Hann rakaði húðir, barkaði tær og skar tær út til skøðir. Bátar komu við sildagørnum til hansara at bøta.

### Hjá Dánjali, Díðriki og Mikkjali

Næsta húsið var hjá Dánjali. Tað var annarleiðis. Har var so mikið av jarðarmuni, at kýrnar stóðu í kjallaranum, sum tó var ógvuliga lágur. Hjá Dánjali var eisini roykstova, spísikamar, stova og kamar. At byrja við var eitt petti millum húsini hjá Dánjali og Mikkjali, men nakað seinni kom Díðrikkur, og hann slapp at kleikja seg niður millum hesi bæði húsini. Hansara hús gjørdust tískil sera smá. Men hann slapp so undan at byggja báðar galvarnar. Har var bara ein lítil roykstova og ein lítil stova. Kúgvin stóð í roykstovuni. Kona Díðrik var úr Kollafirði og æt Stina.

Tað vestasta húsið niðri í Túni var hjá